## Yacht við paparazzi-verju

Tú kanst siga nógv um Chelsea-eigaran, Roman Abramovich, men natin er hann ikki. Í fjør tveitti hann 2,5 milliardir krónur á borðið fyri heimsins størstu yacht, men nú vísir tað seg, at hetta bert er grundprísurin á bátinum. Og tá tú ert nummar 11 á listanum yvir heimsins ríkastu menn, er tú ikki nøgdur við nakrar kahúttir og eitt gassbluss. So við allari eykaútgerð endar prísurin fyri Eclipse, sum yachtin eitur, uppi á 6,3 milliardum krónum. Men sjálvandi, tá pengar einki hava at siga... Nú kann hann í hvussu er skriva »eigari av heimsins størstu yacht« á visitkortið, og báturin er í orðsins sanna týdningi hansara egni. Eclipse er panseraður uttan og hevur eina missilskipan, sum heldur almenningin burtur. Og fyri at tað ikki skal verða lygn hevur báturin eisini eina laserskipan, ið skjýtur strálur móti myndatólunum hjá nærgangandi paparazzi'um, so myndirnar oyðileggjast. Roman Abramovich má tó bíða til seinni í ár at yvirtaka Eclipse, skrivar danska blaðið Børsen.



# Tíðin ikki farin frá Grønu Oynni

**Á tingfundinum mikudagin samtykti tingið, at Annika Olsen skal svara fyrispurningi frá Bjarna Djurholm um Nólsoy sum grøna oyggj**

FYRISPURNINGUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm setti sjálvur sum vinnumálaráðharri verkætlanina um Nólsoy sum grøn oyggj í gongd*

Tað var Bjarni Djurholm, sum í sínari tíð sum vinnumálaráðharri tók stig til eina verkætlan, har Nólsoy skuldi gerast grøn oyggj. Verkætlanin gekk í stuttum út upp á, at øll húsarhald og virkir í oynni skuldu fáa hita og streym frá trimum vindmyllum, sum umvegis eina tøkniliga skipan skuldi framleiða vetni.

Men eftir fleiri ára kanningar datt hendan verkætlanin niðurfyri, og hví gjørdi hon so tað.

Tað var komið mest sum upp undir land um ársskiftið 2007/08, og Jarðfeingi hevði tá saman við Statoil Hydro, Enercon, SEV og Tórshavnar kommunu stungið út í kortið, hvussu ætlanin skuldi fremjast. Og hon var fíggjarliga burðardygg um so var, at landið kom inn og veitti MVG-frítøku, og tilboðini annars hildu seg innan teir karmar, ið ásettir vóru, sigur Bjarni Durholm.

Ítøkiliga hví verkætlanin datt niður fyri dugir Bjarni Djurholm tó ikki at siga.

Men eftir valið í 2008 kom verkætlanin ikki á skránna, og er ikki komin síðani. Ein av orsø.kunum til, at eg nú spyrji um verkætlanina er, at í sínari tíð var verkætlanin eisini tengd at einum nýggjum nólsoyarskipi. Og hóast tað kanska ikki er so heilt aktuelt nú, so var hetta partur av eini verkætlan, har Nólsoyggin var umboðandi eina varandi orkuskipan, og at oyggin var púra leys av fossilari orku, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at tað í sær sjálvum varð hildið at vera slóbrótandi, og tí er tað spell, at verkætlanin ikki er komin longur.

### Fyrimynd

Hóast hetta var ein føroysk verkætlan í tann mun, at skipanin skuldi setast í verk í Nólsoy, so var fíggingin ikki føroysk burturav.

Kaningararbeiðið, sum gekk fyri seg í nøkur ár, var fíggjað av Norðurlandaráðnum, og hesar mátingar vórðu gjørdar í Nólsoy. Enercon er ein týsk vindmyllu fyritøka, Statoil Hydro er norskt, so tað var bæði føroyskur og útlendskur kapitalur í verkætlanini, men ikki minst útlendsk tøkni var inni í myndini, sigur Bjarni Djurholm.

Hann heldur, at serliga hetta við útlendskari tøkni gjørdi verkætlanina serliga áhugaverda, tí hevði hon verið framd, hevði hon uttan iva vakt stóran ans aðrastaðni eisini.

Men eg haldi ikki, at vit hava sitið sjóvarfallið av okkum, og tí spyrji eg, um farið verður víðari við ætlanini, tí hon kemur at hava altjóða áhuga, eingin ivi um tað, eins og hon kann verða ein fyrimynd fyri orkuútbygging í Føroyum generelt, sigur Bjarni Djurholm.

Tíðin burdi eisini verið júst hin rætta beint nú, tá tað verður tosað so nógv um umhvørvi og varandi orku.

Tað er í hvussu er nakað, ið átti at motivera enn meir, nú arbeitt verður fyri at skerja $CO_2$ útlátið í Føroyum. Vit vita tað, at ein slík verkætlan í sær sjálvum ikki fer at gera tann stóra munin, men virkar skipanin, virkar hon eisini alla møguliga aðra staðni eisini. Og tí kann hon verða ein fyrimynd og til frama fyri menning av alternativari orku, bæði í Føroyum og aðrastaðni, sigu Bjarni Djurholm.

Annika Olsen fer væntandi at svara upp á fyrispurningin í aðru viku.

# Føroyar limir í WAIPA

**Føroyar eru nú vorðnar limir í altjóða felagsskapinum World Association of Investment Promotion Agencies, stytt WAIPA**

*Tíðindaskriv*

Útlendskir íleggjarar skapa búskaparligan vøkstur, og tí gera lond nógv burtur úr at draga útlendskar íleggjarar til sín, at gera íløgur júst í teirra landi.

Talið á altjóða íleggjarum er nógv vaksið seinastu árini orsakað av altjóðagerðini. Tað sama er kappingin um útlendskar íleggjarar. Serliga er kappingin hørð, tá talan er um at draga íleggjarar til vitanartungar vinnur.

Sum partur í føroyska arbeiðinum at marknaðarføra Føroyar sum íløguland, hava Føroyar fingið limaskap í altjóða felagsskapinum, WAIPA.

WAIPA er ein altjóða felagsskapur fyri lond og felagsskapir, sum arbeiða við at draga útlendskar íleggjarar til sín. Endamálið hjá WAIPA er fyrst og fremst samstarv og vitanarbýti. Í WAIPA eru 228 limir úr 156 londum.

Jóhan Dahl landsstýrismaður í vinnumálum sigur:

- ...at hann fegnast um, at Føroyar eru vorðnar limur í altjóða felagsskapinum WAIPA. Samstarvið við WAIPA skal fáa gongd á arbeiðið at merknaðarføra Føroyar sum íløguland. Í felagsskapinum eru nógvar smátjóðir limir. Fleiri av hesum smátjóðum hava klárað seg væl, tá talan er um at draga íleggjarar til sín, og júst frá hesum smátjóðum kunnu vit læra, hvussu vit í Føroyum fáa sum mest burtur úr, nú vit fara í holt við at bjóða okkum fram, verður sagt í tíðindaskrivi frá Invest in the Faroes.



*Johan Dahl, vinnumálaráðharri, fegnast um limaskapin*